# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Andlát og jarðarferðir

**Sverri Hansen, Norðragøta**, andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin, 61 ára gamal.

**Peter Martin Joensen, Saltnes**, andaðist týsdagin á Vesturskin, 85 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Fríðrikskirkjuni fríggjadagin kl. 15. Tey, ið vilja minnast Peter Martin, kunnu lata Fríðrikskirkjuni eina peningagávu.

**Sørin Emil Olsen** vanliga nevndur Emil, ættaður av Skála **búsitandi á Glyvrum,** andaðist á Landsjúkrahúsinum mánadagin, 89 ára gamal. Kistan fer úr Landssjúkrahúskapellinumhósdagin kl. 17 heim í Glyvra Kirkju. Jarðarferðin verður fríggjadagin kl. 13. Tey sum vilja minnast Emil kunnu lata Eysturoyar Ellis-og Røktarheimi eina gávu, konto í peningastovnunum.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at okkara elskaði maður, pápi, verfaðir, abbi og beiggi

**Sverri Hansen**
Norðragøta

andaðist á Landssjúkrahúsinum týsdagin 8.sep., 61 ára gamal
Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Gøtu Kirkju leygardagin kl. 14.00.

*Familjunnar vegna*
**Súsanna, Súni, Maiken & Jenny**

Tey, ið ynskja at minnast Sverra, kunnu lata eina peningagávu til Føroya felag móti krabbameini, konta í peningastovnunum

## Dagurin

10. september. Burchardt, doyði umleið ár 754. Hann var enskur munkur. Fór sum trúboði til Týsklands og gjørdist fyrsti biskupur í Würtzburg.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*



Les Sosialin so ert tú við

# Til mammu og babba

## á diamantbrúdleypsdegnum

Í dag, tann 10.09.09, hava Hans og Kamilla Sørensen diamantbrúdleyp.

Kamilla Sørensen, fødd Andreassen, er dóttur Magnus Andreassen úr Fuglafirði og Fíu (í Fjósi) fødd Hansen. Hans Sørensen er úr Trongisvági og er sonur Janus Sørensen og Sigrid Sørensen, fødd Lindberg.

Vit fimm sysktini við familju eru í tí hepnu støðu, at vit sleppa at uppliva, at foreldur okkara kunnu feira 60 ára brúdleypsdag . Tá lagnan hevur víst tykkum tað blíðsemi, at tit framvegis hava hampuliga heilsu og nú sleppa at uppliva henda dag saman, so er nógv at vera takksamur fyri.

Í gjøgnum hetta langa hjúnarband hava tit verið búsitandi í Havn, og kann tað av røttum sigast, at tit eru vorðin ein býarmynd. Stundum spákandi eftir havnargøtum, stundum sum gestir í svimjihylinum og til tíðir sitandi saman á beinkinum í SMS.

Babba, tín yrkisleið hevur verið frá hýruvognsførara á ungum døgum áðrenn tú gjørdist rørleggjari. Tú starvaðist hjá Mariu Poulsen í fleiri ár, var sjálvstøðugur og seinni umsjónarmaður á Telefonverk Føroya Løgtings í 25 ár.



Mamma, áðrenn tú bleiv gift starvaðist tú fyrst hjá Heinesen og síðani hjá Niels Arge. Men sum kvinnur flest tá á døgum gavst tú við hesum fyri at passa heimið, sum gjørdist miðdepilin í okkara lívi. Her hevði tú nógv um at vera, tí húsið tíðum var fult av gestum, tí ferðasambandið ikki var so gott sum í dag.

Vit hava øll havt gleði av tínum serliga góðu evnum at tekna og mála. Tú hevur teknað okkum øll stór sum smá, og prýða hesar myndir tykkara og okkara heim í dag.

Nú, tá tit hátíðathalda diamantbrúdleyp, er stuttligt at minna tykkum á, hvussu tit hittust á fyrsta sinni, og var hetta sum í einum røttum ævintýri. Tit vóru í somu veitslu, tá mamma var so óheppin, at hælurin á skónum datt undan. Ímyndast kann, hvussu keðiligt støða hetta er at koma í hjá eini veitsluklæddari kvinnu. Mamma lovar, at tann, ið megnar at hjálpa sær við at fáa hælin fastan aftur, skal verða løntur við einum kossi. Einasti persónur, ið megnaði hesa uppgávu, var tú góði babba. Og her byrjaði tykkara lívsleið saman. At júst tú, babba, megnaði hesa avbjóðing, undrar okkum als ikki, tí tað sigur so nógv um tíni góðu evni. Tú er ein sera handaligur og arbeiðssamur maður, so trupult er at finna tín líka.

Eftir 60 ára hjúnarband, er familjan vorðin stór. Tit eiga fimm børn, sum eru Tummas, Sigrid, Sofía, Maja og Sonja. Tit eiga 15 ommu- og abbabørn, 10 langommu- og langabbabørn, umframt at eitt er á veg.

Á diamantbrúdleypsdegnum eru tit burturstødd. Tit hava sæð tykkum føran fyri at fara til dóttir tykkara í Ålborg og vóna vit, at tit fáa ein góðan dag saman.

Hjartaliga tillukku elskaðu mamma og babba.

**Ynskja børn, svigerbørn, ommu- og abbabørn og langommu- og langabbabørn.**

# Til minnis um mína fittu Klaru ommu

Omma fekk altíð ein at føla, at hon hevði bíðað allan dagin, bara at síggja teg og nú var dagur hennara fullkomin.

Tann 26. juni stendur sum prentaður í høvdinum hjá mær. Tað var bakandi sól, og eg var ikki meira enn komin oman á fótbóltsvøllin, tá mamma ringdi og segði, at eg og babba máttu skunda okkum út á Ellis- & røktarheimið í Runavík, tí omma lá til at doyggja. Eg rann niðan til okkum og segði við babba sum var, hann skundaði sær inn at skifta. Ímeðan ringdi eg til systir mína, Klaru, sum var komin út á Ellisheimið, og tá bar hon tey tungu sorgarboð, at omma okkara var farin frá okkum.



Eitt gamalt enskt orðatak sigur: There's no place like home except Grandma's. Heimið hjá tær og abba hevur altíð verið eitt stað har ein hevur følt seg ógvuliga vælkomnan og eitt stað har øll familjan hevur verið samlað.

Góða fitta omma, tú vart tann besta omman, ein kundi ynskja sær. Tí er saknurin av tær ómetaliga stórur. Men tíbetur eiga vit øll nógv góð og hugnalig minnir um teg. Hvussu tú virdi øll fólk líka og altíð vart so fitt og blíð við øll fólk. Hvussu tað altíð kom eitt stórt smíl á varrar tínar, tá ein kom at vitja teg. Eisini kann eg minnast aftur á, tá vit svóvu hjá tykkum, hvussu vit sótu í spísistovuni áðrenn farið var til songar, har annahvørt tú ella abbi lósu eina bøn, bóðu faðir vár og síðani signaðu okkum. Ikki minst minnist eg væl tann besta milliónbúffin tú gjørdi.

Góði abbi, saknurin hjá tær er ómetaliga stórur, men vit eru øll her fyri teg. Jesuspápi verði hjá tær.

Hvíl í friði góða omma.

**Sigrid**

Av tí at myndin manglaði til hesi minningarorðini, sum vóru í blaðnum týsdagin, kemur teksturin í aftur í dag við mynd.

*- red*